# VINNUSÍÐURNAR

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ein boya skal framleiða á Chestnut

**Ein nýggj oljuframleiðandi tøkni, ið hóskar seg væl til smá oljuøkir, skal framleiða ta fyrstu oljuna hjá Atlantic Petroleum.**
**Framleiðslupallurin, sum flýtur omaná sjónum eins og ein boya, er doypt Hummingbird og verður bygdur í Kina og Hollandi**

OLJUFRAMLEIÐSLA
*Hilmar Simonsen*

Saman við fyristøðufelagnum Venture Production má Atlantic Petroleum sigast at ganga nýggjar leiðir, tá tað fer at framleiða olju frá bretska økinum Chestnut væntandi seinni í hesum árinum.

Sokallaða FPSO-framleiðslueindin hevur staðið í gerð í Kina síðani einaferð í fjør, men varð tann 8. mars silgd til Rotterdam í Hollandi. Har verður megin-parturin av tøknini í løtuni installerað.

Pallurin skal eftir ætlan vera liðugur seinni í hesum árinum, haðani hann skal flytast beinleiðis út á Chestnut leiðina til at framleiða teir fyrstu oljudroparnar hjá Atlantic Petroleum.




*- Hummingbird er tann fyrsta framleiðslueindin, sum ikki er eitt skip. Hann er at kalla bert ein boya, ella ein tangi, ið er nógv einfaldari enn eitt framleiðsluskip. Boyan er 60 metur í tvørmáti og 20 metur høg, sigur Wilhelm Petersen*





### Ein oljuframleiðandi boya

Men hvat er tað so, sum ger framleiðslupallin Hummingbird til nakað serligt. Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum:

- Hann er tann fyrsta flótandi framleiðslueindin, sum ikki er eitt skip. Hann er at kalla bert ein boya, ella ein tangi, ið er nógv einfaldari enn eitt framleiðsluskip. Boyan er 60 metur í tvørmáti og 20 metur høg, greiðir hann frá.

Talan er um eitt munandi bíligari konsept enn ein vanlig FPSO-eind (FPSO stendur fyri Floating Production, Storage and Offloading vessel). Hendan FPSO-eindin er gjørd soleiðis, at hon kann snara um ein snúningsdepil, so at hon melur eins og vindurin blæsur. Bert ein FPSO-eind av hesum slagnum er bygd frammanundan, og hon er farin til statsognarliga brasilska oljufelagið Petrobras. Sum skilst standa fleiri av slagnum í gerð.

- Hetta hevur samtakið mett sum ta mest optimalu loysnina til at framleiða á Chestnut, og avtalan um at byggja eindina varð gjørd fyri 3 árum síðani. Hon er løtt at flyta og væl egnað til framleiðslu í smærri marginalum økjum, sum Chestnut, sigur Wilhelm Petersen.

Í komandi ár er ætlanin at byrja framleiðslu í einum øðrum loyvi hjá Atlantic Petroleum í bretskum sjógvi, sum kallast Ettrick. Ettrick-leiðin er á leið 5 ferðir so stór sum Chestnut, og tí verður her talan um at brúka eina meiri vanliga FPSO eind, sum er eitt framleiðsluskip.

# Jyllands Posten viðger Atlantic Petroleum sum íløgu

**Tann varni íleggjarin skal halda seg burtur frá at gera íløgu í Atlantic Petroelum, tí ótryggleikin er stórur. Hinvegin er møguligt at gera kvetti hjá tí vágafúsa íleggjaranum, um hann torir at taka ein kjans. Tað skrivar danska blaðið Jyllands Posten**

PARTABRÆVAÍLØGA
*Hilmar Simonsen*

Atlantic Petroleum er ikki longur eitt føroyskt partafelag burturav, sum tað var við stovnan í 1998.

Í dag eru 66 prosent av partapeninginum føroyskir, 19 prosent danskir, 7 prosent úr øðrum londum, meðan eftirverandi 8 prosentini ikki hava skrásettan heimstað. Felagið hevur í dag 3.350 partaeigarar.

At nærum ein fimtingur av partapeninginum koma úr Danmark, fyrst og fremst teknaðir av donskum eftirlønargrunnum, er óivað ein grund til, at danskir fjølmiðlar í alt størri mun vísa føroyska oljufelagnum áhuga. Áhugin kemur sum vera man í kjalarvørrinum av, at felagið varð skrásett á keypsskálanum OMX í Keypmannahavn á heysti í fjør.

Fyri góðari viku síðani fór blaðið Jyllands Posten nærum inn undir húðina á Atlantic Petroleum, har tað skrivaði um felagið undir einum teigi nevndur "ugens aktie". Blaðið skrivar um ambitiónirnar hjá felagnum at vaksa, og at tað stendur á gáttuni til at gerast oljuframleiðari.

### Tað snýr seg um vágafýsni

Í síni lýsing av Atlantic Petroleum sum "ugens aktie" skrivar blaðið, at keyp av partabrøvum í felagnum eru at meta sum tilskilað teimum vágafúsu íleggjarunum. Hetta skal skiljast á tann hátt, at vandin fyri tapi er avgjørt til staðar, tí hóast felagið fer at framleiða olju av Chestnut leiðini seinni í ár, og væntandi av Ettrick leiðini í 2008, so eru inntøkurnar frá framleiðsluni tengdar at oljuprísinum og støðinum á dollaranum. Hartil kunnu tekniskar forðingar stinga seg upp í sambandi við installatión av framleiðslueindunum.

Hinvegin letur blaðið ongan iva vera um, at møguleikin fyri stórum vinningi avgjørt er til staðar, um viðurskiftini tekna seg til fyrimuns fyri Atlantic Petroleum. Blaðið leggur dent á, at stutta tíðarskeiðið, Atlantic Petroelum hevur verið listað á OMX í Keypmannahavn, ger, at ikki ber til at koma við eini søguligari meting av partabrævagongdini í felagnum.

Blaðið endar við mæla tí varna og lítið vágafúsa íleggjaranum frá at keypa partabrøv í Atlantic Petroelum, meðan tann vágafúsi íleggjarin kann økja munandi um sínar møguleikar fyri stórum vinningi, um hann torir at taka kjansin og gera íløgu í felagið.